## Schmeichel reiggjar svørðinum

**Fyrrverandi United málverjin, Peter Schmeichel, finst nú hvassliga at leikarunum í Manchester United. Teir hugsa ov lítið um tað, sum fer fram á vøllinum**

Í samrøðu við blaðið Mail on Sunday sigur Schmeichel, at leikararnir hjá United hugsa meira um bilar, og hvør hevur tann størsta diamantin enn tað, sum hendir inni á vøllinum. Hetta síðsta átti sjálvandi altíð at ligið fremst í huganum hjá einum og hvørjum leikara.

Manchester United hevur ikki havt tað besta kappingarárið, og liðið er longu sligið út av Champions League, áðrenn farið verður undir finalurnar. Hetta er fyrstu ferð í eini níggju ár, at tað er hent.

Schmeichel er als ikki sannførdur um, at leikaratilfarið er nóg gott hjá einum stórum felag sum Manchester United. Hann vísir á, at Rooney er ein leikari í heimsflokki, men restin livir ikki upp til hetta støðið.

Schmeichel setir harumframt stórt spurnartekin við, um leikarar sum Ji-Sung Park og Christiano Ronaldo eru teir røttu leikararnir at bera felagið frameftir.

- Liðnum vantar persónligheit. Tað høvdu teir so sanniliga í Roy Keane, men tann einasti leikarin við persónligheit eins og Keane í dag er Rooney, sigur Schmeichel.

Danski málverjin, ið nú arbeiðir sum vertur hjá TV 3, finst eisini at Rio Ferdinand, sum bíðaði leingi, áðrenn hann vildi skriva undir nýggjan sáttmála við United.

- Rio Ferdinand hevur mist alla virðing í felagnum, tí at hann bert hugsar um sítt egna skinn. Uttan Rooney hevði liðið bert verið bleyt miðalvøra, sigur ein ikki sørt bersøgin Peter Schmeichel.

SíS

## Arsenal verða ikki meistarar í ár

**Millum Arsenal og Chelsea var sera spennandi, og kenslurnar vóru sterkar á báðum liðum. Eitt nú fóru venjararnir av vøllinum uttan at taka í hondina á hvør øðrum**

Chelsea vóru skapandi liðið, og vístu klassamunin á liðunum báðum. Tað vóru Arjen Robben og Joe Cole, ið skutu málini. Men eisini Thierry Henry var tætt við, tá hann rakti stongina og út í fyrra hálvleiki. Eisini Joe Cole var tætt við at gera tað til 0-3, men Jens Lehmann í Arsenal málinum fekk fingrarnar á bóltin.

Dysturin var hart spældur, og snuddir og gul kort vóru nógv.

Arsenal byrjaðu ikki at trýsta Chelsea fyrr enn umleið fimm minuttir vóru eftir av dystinum, men hetta var ikki nóg mikið. Hetta er fyrsti sigur hjá Chelsea í Premier League á Highbury síðan í 1990.

-NUD

---

## Sao Paulo fór við heimsmeistaraheitinum

**Tað gjørdist Sao Paulo úr Brasilia, ið vann finaluna í FIFA heimsmeistaraskapinum eftir tepran finalusigur á Liverpool**

Sao Paulo fekk sigursmálið í 27. minutti, tá Luciano da Silva Mineiro Carlos, sum hansara fulla navn er, skoraði einasta málið í dystinum.

Liverpool royndi at trýsta í seinna hálvleiki og hevði eitt ótal av hornaspørkum. Eisini fekk Liverpool trý mál kolldømd - tvey av teimum fyri rangstøðu, sum Sao Paulo dugdi sera væl at nýta.

Í 88. minutti hevði Liverpool bóltin í netinum, men Garcia varð mettur at vera rangstaddur. Liverpool leikararnir vóru sera ónøgdir við hendan dómin hjá linjuverjanum, og myndirnar vístu eisini, at Garcia ikki varð rangstaddur í hesi støðu.

Sao Paulo fór sostatt avstað við steypinum fyri triðju ferð í søgu felagsins.

# Owen kann bjarga

**Kravið til Graeme Souness er greitt. Newcastle skal út í Europa, um hann framhaldandi skal sleppa at sita við stýrisvølin. Ein uppgáva, sum tóktist mest sum vónleys, inn til Newcastle tveitti 17 milliónir pund á borðið**

PREMIER LEAGUE
*Jákup Mørk*



Við ein hat-trick á útivølli móti West Ham prógvaði Michel Owen enn einaferð, at hann er maðurin, sum Newcastle áskoðararnir skulu seta sítt álit á, tá Alan Shearer takkar fyri seg.

Eins og hann hevur verið tað á landsliðnum, so er Michael Owen væl tann spælarin í Bretlandi, sum er best førur fyri at taka við tunga arvinum eftir Shearer. Hann hevur eins og hesin altíð staðið fyri nógvum málum. Hann hevur havt fleiri drúgvar skaðar at stríðast við, men er altíð komin aftur. Og hann hevur eisini sama mátan at feira eitt mál uppá. Rennandi móti áskoðarunum við flatari høgru hon á lofti.

### 40 ár uttan steyp

Og tað er einki at ivast í, at venjarin hjá Newcastle, Grame Souness, fegin sær útstrekta armin fleiri ferðir afturat hetta kappingarárið. Bæði tí hetta sjálvsagt markerar enn eitt Owen-mál. Men ikki manst eisini í symbolskum týdningi, tí seinastu avrikini hjá Owen mugu nærum metast sum ein hjálpandi hon til venjaran.

Ofta verður tikið til, at harðasta venjastarvið í fótbóltsheiminum er tað, sum enski landsliðsvenjarin hevur. Men Souness man nokk ikki vera ein av teimum, sum uttan víðari er samdur í hesum. Í øllum førum man eisini kenna trýstið á sínum persóni sera stórt. Hóast Newcastle verður roknað sum eitt av stóru feløgunum í Onglandi, so eru tað altso 40 ár síðani, at felagið vann nakað sum helst. Heldur ikki hóast teir undir Keegan vóru sera nær við, eins og Gullit tvær ferðir fekk liðið í FA-Cup finaluna, har talan tó báðu ferðirnar gjørdist um tap.

Tað verður kanska ikki í ár, at Newcastle aftur skal hava nakað steyp í skápið. Men formaðurin í felagnum, Freddy Shepherd, hevur givið Souness greið boð. Newcastle skal nú aftur út í Europa. Og at til tíðir gírigi formaðurin meinar hetta í álvara, sæst helst eisini aftur í transfer-pengunum, sum hann nýtt seinastu árini. Ikki minst í ár har størsti parturin av hesum vórðu altso nýttir til keypið av Michael Owen. Eitt keyp, sum líktist einum tvingandi neyðugum stig, tá Newcastle als ikki hevði ars, at hann heldur vildi til Liverpool. Felagið, sum heldur ironiskt vann Champions League árið eftir, at teir høvdu selt spælaran, sum fleiri hildu vera hin týdningarmesta hjá felagnum.

Tað stóð tó skjótt greitt, at Liverpool ikki hevði peningin at keypa Owen fyri, og tí gjørdist Newcastle loysnin fyri spælaran, sum ongan tíð av álvara fekk álit frá venjaranum í Real Madrid.

## FAKTA

### Michel Owen

175 cm/66 kg
Føddur: 14. desember 1979 í Chester
Fyrsti dystur í Premier League: Móti Wibledon í 1997
Fyrsti landsdystur: Móti Chile í 1998

Feløg:
Liverpool, 1997-2004
297 dystir/158 mál
Seldur til Real Madrid fyri £ 8.000.000 + Antonio Nunez
Real Madrid, 2004-2005
34 dystir/13 mál
Seldur til Newcastle fyri £17.000.000
Newcstle, 2005-?
8 dystir/7 mál
Ongland, 1998-?
75 dystir/35 mál

vera væl nøgdir, tá Owen á tíðindafundi staðfesti, at hóast dreymurin var koma aftur til Liverpool, so gleddi hann seg nú til at skjóta mál fyri Newcastle. Nógv mál.

### Lívbjargandi hat-trick

Og við sjey av slagnum í fyrstu átta dystunum má eisini sigast, at Owen hevur leverað vøruna higartil.

Móti West Ham var talan um ein sokallaðan Newcastle dyst, har talan varð um fleiri upp- og niðurtúrar. Sigurin var kanska ikki so uppiborin, sum tølini staðfesta. Men Michael Owen var munurin.

Longu eftir fimm minuttum hevði hann sett bóltin fram við Roy Carrol, eftir at Shearer hevði longt bóltin til álopsfelagan. Nolberto Solano skoraði tó eitt vakurt sjálvmál, soleiðis at West Ham aftur var í dystinum, og so var skjóti fyrimunurin hjá gestunum burturi.

West Ham fekk eisini eina yvirvág í spæli, men Owen var aftur maðurin, sum stutt